VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi. Turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið hósdagin:
Fleyr til gul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fleyr til gul av vestri ella av ymsum ættum, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Fleyr til gul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 16 stig.

Jakobina Tórstún við nýggjari fløgu

FLØGUÚTGÁVA

Í ólavsøkuvikuni kemur fløgan "Rensl" við Jakobinu Tórstún á marknaðin

Lítið hevur verið at hoyrt til Jakobinu, síðan hon fyri 25 árum síðani var við á plátuni "Gluggamynd" saman við beiggjanum, Paula.

Hesaferð er tað Jakobina einsamøll, sum stendur fyri útgávuni, men hon hevur fingið góða hjálp frá einari rød av okkara bestu og royndastu tónleikarum. Á fløguni hoyrast - umframt Jakobinu - Pauli Hansen, Jógvan Dahl, Thomas M. Smith, Kári P., Fróði Vestergaard, Terji Rasmussen, Jónleif Jensen, Arnbjørn Sivertsen, Jóan P. Andreassen, Hildebjartur Hansen, Ólavur Olsen, Magnus P. Poulsen, Tóri Restorff Jacobsen, Mikael Thomsen, Kolbein Simonsen og Sámal Ravnsfjall.

Jakobina eigur sjálv fýra av teimum tíggju løgunum á fløguni, meðan bróðurin, Pauli Hansen, Per Debess, Birgitte Hylin og Lilja Trúgvadóttir eiga hini. Ein tekst hevur Jakobina eisini skrivað, meðan hinir orðasmiðirnir eru Jóanes Nielsen, Rói Patursson, Kári P, T. N. Djurhuus, Aleksandur Kristiansen og Hans J. Glerfoss.

Terji Rasmussen hevur staðið fyri upptøkunum, sum eru gjørdar í Oyravox-upptøkuhølunum í Nólsoy, og fløgan er miksað og mastrað í Danmark. Tí arbeiðinum hevur Flemming Hanson staðið fyri.

Olivur við Neyst hevur gjørt permumyndina, meðan Hannis Egholm hevur staðið fyri grafisku sniðgevingini.

Tónleikurin á fløguni er melodiøsur og lættur fólkatónleikur, har stórur dentur eisini verður lagdur á tekstsíðuna.

Jakobina sigur, at við fløguheitinum "Rensl" hugsar hon um tað, sum rennur okkum í huga, streymar ígjøgnum okkum, bæði fyrr, nú og í framtíðini.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	17
Nuuk	14
Qaqortoq	17
Ammassalik	8
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	14
Lerwick	13
Aberdeen	18
London	16
Tromsø	--
Bergen	13
Oslo	--
Stokkhólm	14
Keypmannah.	19
Helsinki	15
Moskva	19
Berlin	17
Warzawa	23
Kiev	26
Bukarest	32
Paris	18
Madrid	27
Róm	26
Malorca	27
Athen	35
Malta	28
Tunis	35
Beijing	33
New Dehli	33
Bangkok	31
Jakarta	--
Sydney	13
New York	30
Miami	31
Los Angeles	21
Meksikobýur	23
Panama	--
La Paz	2
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	1

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt hátrýst, 1022 hPa. í landnyrðing úr Íslandi viknar. Eitt lágtrýst, 1002 hPa. við Hebridurnar stendur mestsum í stað.



Í dag:
Eitt hátrýst, 1024 hPa. yvir Atlantshavinum stendur í stað og ein hátrýstryggur til Íslands verður yvir Føroyum hósdagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 9/7 kl. 06^{00} – 10/7. 06^{00}. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. 06^{00}– 2/7 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juli: 28,0 mm

Tiltøk í Miðlahúsinum í juli

Týskvøld 17. Juli kl. 20.00
Konsert við Stanley Samuelsen

Mikukvøld 18. Juli kl. 19.30
MFS skipar fyri kjakkvøld um umstøður teirra lesandi í Føroyum

VESTFALLSKYRRINDI

9. juli	Mánin næstur jørðini
14. juli	Tendring
22. juli	Fyrra kvarter
	Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
17. Juli	09.51	22.13	08.51	21.13	09.06	21.28	11.51	-	00.29	12.51	08.06	20.28	07.06	19.28	10.06	22.28	11.06	23.28	09.36	21.58	10.51	23.13
18. Juli	10.33	22.53	09.33	21.53	09.48	22.08	00.13	12.33	01.13	13.33	08.48	21.08	07.48	20.08	10.48	23.08	11.48	-	10.18	22.38	11.33	23.53
19. Juli	11.12	23.32	10.12	22.32	10.27	22.47	00.53	13.12	01.53	14.12	09.27	21.47	08.27	20.47	11.27	23.47	00.08	12.27	10.57	23.17	-	12.12
20. Juli	11.51	-	10.51	23.09	11.06	23.24	01.32	13.51	02.32	14.51	10.06	22.24	09.06	21.24	-	12.06	00.47	13.06	11.36	23.54	00.32	12.51
21. Juli	00.09	12.28	11.28	23.48	11.43	-	02.09	14.28	03.09	15.28	10.43	23.03	09.43	22.03	00.24	12.43	01.24	13.43	-	12.13	01.09	13.28